# UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 23.02.2023 |
| Mál nr.: | 23/05362-9 |
| Málsviðgjørt: | JND |
| Ummælistíð: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Húsalánsgrunn**
(Strika krav um fígging frá øðrum íleggjarum í sambandi við bústaðabygging)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 62 frá 31. mai 2010 um Húsalánsgrunn, sum broytt við løgtingslóg nr. 140 frá 6. oktober 2011, løgtingslóg nr. 125 frá 7. desembur 2012, løgtingslóg nr. 81 frá 29. mai 2017 og løgtingslóg nr. 34 frá 26. mars 2021, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 8 c verða stk. 2 og 3 orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Av 450 mió. kr. skulu 250 mió. kr. fíggja bústaðabygging kring landið. 200 mió. kr. skulu fíggja bústaðaverkætlanir til serligar málbólkar. Landsstýrismaðurin tekur, í samráð við Húsalánsgrunnin, avgerð um staðseting og avmarking av málbólkum til íbúðarverkætlanir til serligar málbólkar.
*Stk. 3.* Húsalánsgrunnurin kann fíggja verkætlanir sambært stk. 1, 1. punktum saman við øðrum íleggjarum, og skal grunnurin, tá um slíkar verkætlanir ræður, virka undir somu treytum, sum teir partar, ið luttaka í verkætlanini saman við Húsalánsgrunninum."

**2.** Í § 8 c verður stk. 4 strikað.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Í verandi løgtingslóg um Húsalánsgrunn er eitt krav um, at Húsalánsgrunnurin (Bústaðir), sum meginregla, skal samstarva við aðrar íleggjarar, tá Bústaðir byggir bústaðir kring landið. Hetta kravið tarnar Bústøðum í arbeiðinum at útvega bústaðir. Kravið um samstarv ber í sær, at Bústaðir, sum meginregla, skal rokna sær fíggjarligt avkast fyri bústaðir, sum grunnurin byggir, svarandi til avkastkravið hjá hinum íleggjarunum. Av tí saman verður húsaleigan fyri bústaðirnar hægri enn hon hevði verið, um Bústaðir einsamallur fíggjaði og rak bústaðirnar, uttan at roknað sær vinning.

Endamálið við Bústøðum er, sambært § 1 í løgtingslóg um Húsalánsgrunn:

1) at virka fyri at øll í Føroyum skulu hava møguleika fyri at útvega sær ein bústað
2) at tryggja fjølbroytni á bústaðamarknaðinum, og
3) at stuðla upp undir veðurlagspolitikk Føroya og at minka um orkutørvin á føroyska bústaðamarknaðinum.

Í løtuni er nógv tann størsti parturin av bústaðareindunum í landinum eigarabústaðir, og kostnaðurin fyri at seta búgv er ógvuliga høgur. Somuleiðis er húsaleigan fyri flestu leigubústaðir á einum støði, ið øll ikki megna at rinda.

Bústaðarpolitiska amboð okkara - Bústaðir - eigur at virka eftir tí bústaðarpolitikki, ið varð almannakunngjørdur í 2012. Í bústaðapolitikkinum varð staðfest, at politiska uppgávan er at tryggja, at útboðið av bústøðum og kostnaðurin fyri hesar eru á einum støði, so menniskju – uttan mun til, hvar tey eru í lívinum – fáa eitt nøktandi heim í mun til teirra tørv. Men treytin, um at Bústaðir skal byggja saman við øðrum íleggjarum, ger, at húsaleigan verður hægri, og samstundis ger treytin um samstarv tað trupult fyri Bústaðir at fara undir nýggjar verkætlanir.

Í summum førum kann tað vera skynsamt, at Bústaðir samstarvar við aðrar íleggjarar um bústaðarbygging. Soleiðis røkkur peningurin, sum Bústaðir hevur heimild at upptaka lán fyri, longri. Somuleiðis eru slíkar verkætlanir ein partur av at tryggja fjølbroytni og at fáa fleiri við til at loysa bústaðartrupulleikan. Tað avgerðandi við lógarbroytingini er, at Bústaðir fær frælsi til at meta um og gera av, hvørjar verkætlanir stovnurin skal fremja einsamallur og, hvørjar verkætlanir best vera framdar saman við øðrum. Soleiðis røkka vit best politisku endamálunum fyri Bústaðir.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Í verandi løgtingslóg um Húsalánsgrunn er í § 8 c, stk. 2 ásett sum meginregla, at tá Bústaðir byggir bústaðir, so skal hetta gerast í samstarvið við aðrar íleggjarar. Í teimum førum, at aðrir íleggjarar ikki eru áhugaðir í at vera við í verkætlanum saman við Húsalánsgrunninum, hevur landsstýrisfólkið heimild at geva undantak frá kravinum um samstarv.

Kravið um samstarv ger, at Bústaðir skal brúka orku uppá at finna áhugaðar íleggjarar og at gera samstarvsavtalur við slíkar. Hesir íleggjarar hava sjálvandi fyrst og fremst fíggjarligan áhuga í at luttaka í verkætlanum saman við Bústøðum, og hesi atlit teirra eru ikki neyðturviliga

sambærilig við endamálið hjá Bústøðum, sum er at fáa til vega eitt fjølbroytt útboð av bústøðum kring landið.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at loysa Bústaðir frá kravinum um, at allar bústaðaverkætlanir skulu fremjast saman við øðrum íleggjarum.

Sambært uppskotinum varðveitir Bústaðir heimildina til at fíggja verkætlanir saman við øðrum íleggjarum. Í teimum førum hetta er skynsamt og fremjandi fyri endamálið við Bústøðum, stendur Bústøðum frítt fyri at arbeiða eftir hesum leisti.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við lógarbroytingini verður kravið um samstarv millum Bústaðir og aðrar íleggjarar tikið burtur, og av tí sama verður heimildin hjá landsstýrisfólkinum, at veita undantak frá hesum kravinum, strikað.

Tó at kravið um samstarv við aðrar íleggjarar verður tikið burtur, varðveitir Bústaðir kortini møguleikan at fara í samstarv við aðrar íleggjarar. Treytin um, at Bústaðir, tá samstarva verður við aðrar íleggjarar, skal virka eftir somu treytum, sum hinir íleggjararnir, verður eisini varðveitt.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið er sent hesum til ummælis:

- Húsalánsgrunninum (Bústaðir)
- Kommunufelagnum
- Felagnum Føroyskir Peningastovnar
- Vinnuhúsinum
- Løgmálaráðnum
- Fíggjarmálaráðnum

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri land ella kommunur.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri land ella kommunur.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Við lógaruppskotinum fellur framíhjárætturin hjá øðrum íleggjarum at vera við í bústaðaverkætlanum hjá Húsalánsgrunninum burtur. Húsalánsgrunnurin fer tí at kunna bjóða bíligari bústaðir enn vinnuligu aktørarnir. So stórur sum eftirspurningurin er á

bústaðamarknaðinum í løtuni, er tó ivasamt, um hetta fer at hava nakra stórvegis ávirkan á vinnuliga bústaðamarknaðin her og nú.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Tá Húsalánsgrunnurin ikki er bundin einum av vinnuligum avkastkravið, fer betur at bera til at byggja bústaðir í økjum, sum ikki eru so áhugaverd fyri vinnuligar íleggjarar. Soleiðis verður møguleikin fyri at seta búgv uttan fyri meginøkið størri og kann hetta í sær sjálvum hava jaliga ávirkan á útjaðaraøki, sum í dag uppliva fráflyting og skeikling í demografiska býtinum av íbúgvum. Verður talan um hækkandi íbúgvatal í ávísum økjum, kann hetta hava við sær avleiddar ávirkanir á eitt nú skúlaøkið, samferðsluøkið og eldraøkið.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Við tað at endamálið við uppskotinum er at fáa til vega bíligari leigubústaðir, má metast, at fleiri fólk enn í dag fara at hava ráð til ein leigubústað. Uppskotið kemur soleiðis serliga av hava jaliga ávirkan fyri fólk og familjur við lágum inntøkum, sum í dag hava trupult við at fáa endarnar at røkka saman.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Eingir millumtjóðasáttmálar eru viðkomandi fyri lógaruppskotið.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Eingir tvørgangandi millumtjóðasáttmálar eru viðkomandi fyri lógaruppskotið .

**2.9. Markaforðingar**
Ongar kendar markaforðingar eru viðkomandi fyri lógaruppskotið.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið inniheldur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, og uppskotið ger eingi inntriv í rættindi hjá fólki.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið áleggur ikki skattir ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið ásetur eingi gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**

Lógaruppskotið leggur ongar nýggjar heimildir til landsstýrismannin ella stovnar.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Ja | Ja | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Ja | Ja | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1, nr. 1**
Broytingin loysir Húsalánsgrunnin frá kravinum um at finna aðrar íleggjarar at vera við bústaðaverkætlanum hjá grunninum, og loysir tískil Húsalánsgrunnin frá kravinum um, at bústaðir, sum eru fingnir til vega við hesi heimild, sum meginregla skulu rekast vinnuliga, t.e. við fíggjarligum vinningi.

Við broytingini varðveitir Húsalánsgrunnurin møguleikan fyri at samstarva við aðrar íleggjarar um bústaðabygging, og er kravið tá til Húsalánsgrunnin, at grunnurin skal virka undir somu treytum, sum hinir íleggjararnir.

**Til § 1, nr. 2**
Í verandi lóg er heimila landsstýrismanninum at geva Húsalánsgrunninum undantaksloyvi til at fíggja verkætlanir einsamallur, tá ávísar treytir eru uppfyltar. Við broytingini dettur kravið

um aðrar íleggjarar burtur, og harvið er grundarlagið undir heimildini at veita undantakloyvi burtur.

**Til § 2**
Gildiskomuáseting.

Umhvørvismálaráðið, xx.xx.2023.

**Ingilín Didriksen Strøm**
landsstýriskvinna

/ Pól E. Egholm

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3:

**Fylgiskjal 1:**

**Javntekstur**

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

| **Galdandi orðingar** | **Løgtingslógaruppskotið** |
|---|---|
| **§ 8 c.** Húsalánsgrunnurin kann harafturat, eftir teimum treytum, ið ásettar eru í § 8 b, stk. 1-5, fíggja bústaðabygging upp til 450 mió. kr.<br><br>*Stk. 2.* Av 450 mió. kr. skulu 250 mió. kr. fíggja bústaðabygging kring landið saman við øðrum íleggjarum, sbr. tó stk. 4. Harafturat skulu 200 mió. kr. fíggja bústaðaverkætlanir til serligar málbólkar. Landsstýrismaðurin og Húsalánsgrunnurin gera avtalu um staðseting og málbólk til íbúðarverkætlanir til serligar málbólkar.<br><br>*Stk. 3.* Tá Húsalánsgrunnurin saman við íleggjarum fer undir verkætlanir á vanliga bústaðamarknaðinum, skal grunnurin virka undir somu treytum sum teir partar, ið luttaka í verkætlanini saman við Húsalánsgrunninum.<br><br>*Stk. 4.* Hóast ásetingina í stk. 2, 1. pkt., kann landsstýrismaðurin loyva Húsalánsgrunninum at fara undir verkætlanir einsamallur, um ongin áhugi er hjá íleggjarum at verða við í verkætlanini ella trupult er at fáa semju við íleggjarar. | **§ 8 c.** Húsalánsgrunnurin kann harafturat, eftir teimum treytum, ið ásettar eru í § 8 b, stk. 1-5, fíggja bústaðabygging upp til 450 mió. kr.<br><br>*Stk. 2.* Av 450 mió. kr. skulu 250 mió. kr. fíggja bústaðabygging kring landið. 200 mió. kr. skulu fíggja bústaðaverkætlanir til serligar málbólkar. Landsstýrismaðurin tekur, í samráð við Húsalánsgrunnin, avgerð um staðseting og avmarking av málbólkum til íbúðarverkætlanir til serligar málbólkar.<br><br>*Stk. 3.* Húsalánsgrunnurin kann fíggja verkætlanir sambært stk. 1, 1. punktum saman við øðrum íleggjarum, og skal grunnurin, tá um slíkar verkætlanir ræður, virka undir somu treytum, sum teir partar, ið luttaka í verkætlanini saman við Húsalánsgrunninum.<br><br>*Stk. 4.* Strikað. |